## 407'arin besti arbeiðsbilur í Danmark




Sosialurin 311820

Danska avísin Børsen hevur júst gjørt árligu royndina, "Danmarks bedste Jobbil". Hetta er fimta árið á rað, at royndin verður gjørd, og í ár stóð kappingin millum 9 dieselbilar. Bilarnir verða royndir uppá allar hugsandi mátar, í býum, landavegi og motorvegi, men eisini verður roynt at leggja trýst á bilarnir í óvanligum støðum, ímeðan kannað verður, hvussu bilarnir klára hesar støðurnar. Hvør bilur fær stig fyri tíggju ymisk øki, har karakterurin er á stiganum 0-10 (10 er best). Samlaða úrslitið er miðal av tølunum hjá teimum fýra dómarunum, ið ikki kendu úrslitið hvør hjá øðrum. Endaliga úrslitið var hetta:

**Besti arbeiðsbilur í Danmark 2004**

| *Nr.* | *Merki* | *Stig (max. 100)* |
|---|---|---|
| 1 | Peugeot 407 1,6 HDI | 87,5 |
| 2 | VW Passat 1,9 TDI | 85,1 |
| 3 | Skoda Octavia 1,9 TDI | 78,9 |
| 4 | Renault Laguna 1,9 cDi | 75,9 |
| 5 | Ford Mondeo 2,0 TDCi | 73,9 |
| 6 | Mazda 6 2,0 DE | 71,4 |
| 7 | Toyota Avensis 2,0 D | 69,7 |

Um vinnaran, Peugeot 407, verður millum annað sagt: "Vit máttu líka ringja til Peugeot fyri at kanna tað enn einaferð. Peugeot valdi at senda ein 407'ara við 1,6 liturs HDI motori, og hann skuldi kappast við 8 øðrum 1,9 og 2,0 liturs diesel-lokomotivum. Men Peugeot 407 1,6 HDI kom, sá og sigraði við tí minsta motorinum í bólkinum… 1,6 liturs HDI motorurin er ein lítil perla… Flott snið, lekkurt interiør og framúr koyrigleði... Trupult er at seta fingurin á nakað… Øll eru samd um at rósa undirvogninum fyri eginleikarnar, og bilurin livdi eisini upp til hetta í royndunum… 407'arin er ikki einans ein av teimum nýggjastu og mest komfortablu í hesum bólkinum, hendan útgávan er eisini ein av teimum alrabíligastu bilunum á marknaðinum…"

Samanumtikið er eingin ivi, Peugeot 407 1,6 HDI koyrir avstað við heitinum "Besti arbeiðsbilur í Danmark 2004".

*Kelda: Børsen*

**P/F Meinhardt Arge**

v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00




*Myndin er frá gongutúri fyrr í ár*

Fólkaheilsa:

# Gongutúrur til Fámjins eftir varðagøtunum leygardagin

Fólkaheilsuverkætlanin í Vági byrjaði fyri einum mánaði síðani. Hvørt ónskvøld eru fólk møtt upp at ganga/súkkla ella renna ein túr í heimligum umhvørvi. Undurtøkan má sigast at hava verðið framúr góð. Talið á teimum luttakandi hevur verðið úr 30 til eini 60 og allir aldursbólkar hava verið umboðaðir. Tað sum helst er ørðvísi við hesi fólkaheilsuverkætlanini er at áðrenn hvønn túr ónskvøld fáa fólk eitt gott orð við á vegnum frá onkrum innan heilsuverki. Hetta er ikki árligt tiltak, men fólkaheilsuverkætlanin varir í 13 vikur (til miðjan desember). Hvønn leygardag er ætlanin at sigla og rógva við Grindabátunum. Tann fyrsta leygardagin í røðini vóru allir Grindabátarnir flotaðir í sambandi við Johannestevnuna. Tá fólk eru liðug við fletting, blóðmørar og sperlar verða bátarnir væntandi aftur flotaðir leygardag.

Nú er tíðin komin til at ganga eftir varðagøtunum av Ryskivatni til Fámjins. Leygarmorgunin kl. 10:00 fer bussur av Kunningarstovuni í Vági (Gamli skúli) niðan til Ryskivatn. Gingið verður eftir varðagøtuni til Fámjins. Túrurin er serstakur, á túrinum er framúrskarandi útsýni vestantil á Suðuroynni, vónandi er klárt í veðrinum leygardagin. Túrurin verður roknaður sum miðal at ganga og tekur uml. hálvan annan tíma.

Tá túrurin er liðugur stendur bussur fyri gongufólkunum í Fámjin og koyrir tey til Vágs. Steðga verður á Hotel Bakkanum har tey sum vilja kunnu keypa sær ein drekkamunn og okkurt gott afturvið.


# Heysttilboð til Aberdeen

**Langt vikuskiftið frá hósdegi til mánadag**
**Galdandi til 13. desembber**

Njótið eitt langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag í Aberdeen á einum av okkara fráliku gistingarhúsum.

**Patio Hotel** ★★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 3.235,-**

**Brentwood Hotel** ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 2.918,-**

**Skene House Íbúðir** ★★★
Fyri hvønn í íbúð
Prísir úr
**Kr. 2.600,-**

**Festival Inns Hotel** ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 2.730,-**

**Albany Guest House** ★★★
Fyri hvønn í tvímanskamari
**Kr. 2.785,-**

**Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways á 34 10 10, á www.atlantic.fo ella á tínari ferðaskrivstovu**

Íroknað: Flogferð við ferðaavgjøldum og innivist í 4 nætur við morgunmati.

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355


# Uppvøkstur og menning hjá ættleiddum

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Ættleiðingafelagnum*

Ættleiðingafelagið skipar fyri fundi fyri ættleiðingarforeldrum og øðrum áhugaðum sunnukvøldið tann 24. oktober. Á fundinum verða tvey evni á skránni.

Tað fyrra evnið er samleiki. Her fer Marianne Wung-Sung, heilsusystur, at greiða frá, hvørjar hugsanir ættleidd børn kunnu gera sær um samleikan. Hetta kann t.d. verða í sambandi við, at barnið byrjar á stovni ella í skúla. Hvat kunnu foreldur og onnur gera, fyri at stuðla menningini hjá barninum?

Tað næsta evnið er heilsa. Barnalæknin Hans Trautner, fer at greiða frá um kanningar fyri at fylgja upp uppá heilsustøðuna hjá barninum. Hann fer eisini at koma inn á spurningin um pubertetin, har fleiri kanningar hava víst, at nógv ættleidd børn koma í kynsbúningaraldur á yngri aldri enn onnur børn.

Fundarfólkið fær høvi at seta spurningar og skifta orð um evnini.

Fundurin verður sunnukvøldið 24. oktober kl. 20 á Pernassinum á Hotel Hafnia.

Málbólkurin eru foreldur at ættleiddum og vaksin ættleidd. Onnur áhugaði eru eisini vælkomin. Áhugað verða biðin um at tekna seg í seinasta lagi mikudagin 20. oktober við at senda ein t-post til adressuna amp@post.olivant.fo ella at ringa á tlf. 518328 ella 318328. Kostnaðurin er 50 kr. fyri hvønn.

Neyðugt er ikki at verða limur í felagnum frammanundan, men Ættleiðingafelagið vónar, at fleiri vilja tekna seg sum lim ella stuðulslim. Hetta kann gerast við at gjalda á konto í penigastovnunum: 300 kr. fyri familjur, 150 kr. fyri einstaklingar og 100 kr. fyri stuðulslimir. Fleiri upplýsingar um felagið eru at finna á heimasíðuni www.aettleiding.fo







Alt vikuskiftið bjóða vit øllum norðoyingum at verða vælkomnar inn í eina „nýggja" Shellstøð.

Nógv spennandi og góð tilboð um vikuskifti.

Leygardagin kl. 15.00 undirskrivað umboð fyri **Mjølnir** og **Shell** undir ein 2 ára sponsorsáttmála og sama dag kl. 17.00, kemur Trølla Omman við Shellbilinum inn á støðina, har hon bjóðar øllum børnunum okkurt lekkurt.

Shell

## SPURNARKAPPING

**VINNINGAR:**

**Viðskiftakort** á kr. 1.000,- frá Shell
**500 krónur** í Malaco-góðgæti
**Ein kassi** av Jolly
**Ein kassi** av Spark

***Hvat fyri oljumerki brúkar heimsins skjótasti bilur-Ferrari bilurin hjá Michael Schumacher?***

*Svar:* *Navn:* *Tlf.:*

*Klipp út og koyr í boksina inni á Shellstøðini. Seinasta freist at lata inn er sunnukvøldið 17. oktober kl. 23.00. Drigið verður í komandi viku. Lýst verður í komandi Norðlýsinum.*






**FERÐIST 2 GJALDIÐ FYRI 1**
**FRAM OG AFTUR VIÐ BILI**

**Til Danmarkar úr 3.270,-***
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

**Til Noregs úr 1.920,-***
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

**Til Hetlands úr 1.680,-***
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Lerwick og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

**Til Íslands úr 2.640,-**
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Seyðisfjörður og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

*Tilboðið er ikki galdandi hesar fráferðir: 6/1, 17/3 og 24/3

**NOREG**

**1 VIKA Á PERS HOTEL**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
16/9-04 – 28/5-05* **úr 6.995,-**
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.
*Í tíðarskeiðnum 30/10-04 – 12/3-05 siglir Norröna ikki til Noregs.

**HETLAND**

**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
16/9-04 – 28/5-05 **úr 5.570,-**
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 9 dagar í summarhúsi.

**HETLAND-CRUISE**
**HÓSDAG TIL MÁNADAG**
PRÍSUR VIÐ HOTELLGISTING
16/9-04 – 28/5-05 **úr 1.500,-**
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 2 nætur á hotelli.

**DANMARK**

**1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
Í HIRTSHALS, EBELTOFT & TRANUM KLIT
16/9-04 – 28/5-05 **úr 5.895,-**
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

**1 VIKA Í SUMMARHÚSI**
**FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL**
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
16/9-04 – 28/5-05 **úr 6.995,-**
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.





**BERGEN-CRUISE**
**Vikuskiftisferð við bili**
**Fyri hvønn einans 1.360,-**
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 2 nætur á hotelli í Bergen í dupultkamari við wc/bað.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

SMYRIL LINE